# Húsavirðið fellur nógv

Íslendski tjóðbankin roknar við, at húsavirðið í Íslandi fer at fella heilt upp ímóti 30 prosentum hetta til árslok 2010. Orsøkin er, at tað verður truplari at læna pengar, samstundis sum útboðið veksur. Bankin sigur, at íløgurnar í hús og íbúðir eru byrjaðar at minka, men at tann veruliga minkingin kemur næsta ár og í 2010. Bankin væntar, at íløgurnar til bústað fara at minka 14 prosent hesi árini, og at húsavirðið kann fella heili 30 prosent.



# Vil hava skattalætta

Hóast tann serliga skattanevndin hjá donsku stjórnini ikki er liðug við sítt arbeiði enn, leggur Bendt Bendtsen, búskaparráðharri, nú dent á, at tað mest umráðandi er at lække inntøkuskattin. Við Børsen sigur hann, at sambært metingum verður búskaparvøksturin 1,4 prosent í ár og 1,0 prosent næsta ár, og at umstøðurnar loyva stjórnini at geva fólki ein lætta í inntøkuskattinum. Men tað eigur at vera ein lætti, sum munar, sigur Bendt Bendtsen.

*Bendt Bendtsen, búskaparráðharri, vil hava lægi inntøkuskatt (Mynd: Scanpix)*

# Eiga at lóggeva um størri eindir

**- Við fleiri enn sjey kommunalum eindum, verða tær minstu eindirnar ov smáar til at røkja kommunalu uppgávurnar effektivt. Við færri enn fýra kommunum er spurningurin, um tað ikki er betur bara at lata landið røkja allar almennar uppgávur, sigur Búskaparráðið**

ÚTJAVNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Búskaparráðið hevur arbeitt við eini frágreiðing, sum lýsir, hvussu ráðið heldur, at ein kommunal útjavningarskipan kann leggjast til rættis.

Á fundi á Hotel Føroyum hósmorgunin hevði formaðurin, Jørn Astrup Hansen, eina framløgu av tí tilfari, sum ráðið er komið til.

Sjálv framløgan tók ein tíma, har formaðurin legði tøl fram sum lýsa, hvussu støðan í ymisku økjunum í landinum er – við inntøkum og útreiðslum.

Hann vísti eisini á, hvussu ein møgulig útjavning millum ymisku økini í landinum kundi farið fram.

Jørn Astrup byrjaði við at vísa til samgonguskjalið, sum leggur upp til størri og skikkaðar kommunalar eindir, so hesar gerast betur førar fyri at taka á seg fleiri uppgávur, samstundis sum eitt javnari tænastustøði verður tryggjað um landið.

Sosialurin hevur hugt at innleiðing, samandrátti og niðurstøðu í frágreiðingini, sum vit fara at gera burtur úr í dag.

### Støðan í dag

Í innleiðingini vísir Búskaparráðið á, at fólkatalið í Føroyum er 48.425, og at landið er skipað í 34 kommunur. Í Tórshavnar kommunu búgva 40% av íbúgvunum, meðan einans 43 fólk búgva í eitt nú Fugloyar kommunu.

Búskaparráðið heldur, at tær smáu kommunurnar forða fyri einum skilagóðum arbeiðsbýti millum land og kommunur, tí flestu kommunur hava als ikki orku til at átaka sær ábyrgdina av vanligum kommunalum uppgávum. Aftrat hesum kemur, at málsøkjabýtið millum land og kommunur í Føroyum er heldur ógreitt.

- Skilagott er at umhugsa, um tað yvirhøvur er neyðugt við kommunum í Føroyum, áðrenn farið verður undir at umskipa kommunurnar.

Búskaparráðið spyr, um tað yvirhøvur er neyðugt við eini tvey-streingjaðari myndugleikaskipan í einum samfelag við so fáum íbúgvum.

Og tó.

- Nógvar orsøkin eru tó til at varðveita kommunalu eindirnar. Ikki allar orsøkir hava búskaparfrøðiligar grundgevingar, men tær kunnu hóast alt vera upp á sítt pláss.



*Tað er ymiskt, sum kommunurnar í Føroyum eru fyri til tess at veita sínum borgarum tænastur*

Í innleiðing síni heldur Búskaparráðið kortini, at um haldast skal fast við at hava kommunalar eindir í Føroyum, eiga hesar at verða færri og størri.

Ráðið heldur, at eini fýra til sjey kommunalar eindir er hóskandi tal.

- Við fleiri enn sjey eindum, verða tær minstu eindirnar óiva ov smáar til at røkja kommunalu uppgávurnar effektivt. Við færri enn fýra kommunum er spurningurin, um tað ikki er betur bara at lata landið røkja allar almennar uppgávur.

### Við lóggávu

Búskaparráðið heldur, at ein samanlegging av kommunum eigur at verða framd við lóggávu, tí tað hevur víst seg at ganga alt ov striltið hjá kommununum at leggja saman sjálvboðið.

Føroysku kommunurnar hava sera ymiskar fíggjarligar fyritreytir. Stundum hevur verið roynt at bøtt um hetta við at flyta fyrisitingarligar eindir og almennar fyritøkur úr miðøkinum til útjaðaran.

- Vit halda ikki, at hetta er skilabesti hátturin at útjavna millum økini, tí ein ávísur samfelagsligur vælferðarmissur kann verða knýttur av at flyta stovnar og fyritøkur við lóg.

Ráðið heldur, at tá ið kommunurnar verða lagdar saman, eigur ein millumkommunal útjavningarskipan heldur at verða sett á stovn.

- Hetta merkir, at peningur tá verður fluttur í staðin fyri fyrisitingarligar eindir og almennar fyritøkur.

Í frágreiðing síni vísir Búskaparráðið á, hvussu ein millumkommunal útjavningarskipan, har misvág í kommunalum inntøkum og útreiðslutørvi, verður skipað.

- Okkara frágreiðing hevur einans til endamáls at vísa, hvussu ein slík skipan virkar, og vit halda, at ein føroysk útjavningarskipan eigur at verða løtt at skilja – ein skipan, sum hóskar til føroysk viðurskifti, sigur Búskaparráðið.

# Útjavningin eigu

**Ójavnin millum kommunurnar í Føroyum ger, at tær hava ymiskar fyritreytir at bjóða sínum íbúgvum tænastur. - Kommunur við høgum inntøkum og lágum útreiðslum hava soleiðis ráð til lutfalsliga lágt skattastøði og høgt tænastustøði, samstundis sum minni hepnar kommunur antin mugu hava eitt lutfalsliga høgt skattastøði – ella lágt tænastustøði, sigur Búskaparráðið**



ÚTJAVNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í samandrátti og niðurstøðu síni vísir Búskaparráðið á, at Føroyar hava eina tvístreingjaða myndugleikaskipan við landsmyndugleika og kommunalum myndugleika.

- Kommunalu myndugleikarnir veita ein stóran part av vælferðartænastunum og fylla nógv í almenna búskapinum – og væntandi er, at kommunurnar fara at fylla enn meira, sum tíðin gongur.

Ráðið vísir á, at inntøkur og útreiðslur eru ójavnt býttar millum føroysku kommunurnar.

- Útrokningar vísa eitt nú, at íbúgvar á Streymoynni høvdu eina miðalinntøku upp á 174.244 krónur, meðan íbúgvar á Sandoynni bert høvdu eina miðalinntøku upp á 132.462 krónur í ár 2006.

### Ymiskar útreiðslur

Útreiðslurnar hjá kommununum eru eitt nú tengdar at fólkabýtinum, har lutfalsliga nógv børn geva størri útreiðslur til barnaansing og fólkaskúla – eins og lutfalsliga nógv eldri fólk geva størri útreiðslur til eldraøkið.

- Tá ið hugt verður at fólkabýtinum, sæst, at 12% av íbúgvunum í Suðuroynni vóru 70 ár, meðan talið í Eysturoy einans var 10% í ár 2006.

Búskaparráðið vísir á, at kommunurnar í Streymoynni sambært miðalinntøkunum fáa meira í kommunuskatti enn kommunurnar í Sandoynni – við sama skattaprosenti.

- Kommunurnar í Suðuroynni hava størri útreiðslur til eldraøkið enn kommunurnar í Eysturoynni.

Ráðið vísir á, at hesin ójavni millum kommunurnar í Føroyum ger, at tær hava ymiskar fyritreytir at bjóða sínum íbúgvum tænastur.

- Kommunur við høgum inntøkum og lágum útreiðslum hava soleiðis ráð til lutfalsliga lágt skattastøði og høgt tænastustøði, samstundis sum minni hepnar kommunur mugu antin hava eitt lutfalsliga høgt skattastøði – ella lágt tænastustøði.

### Útjavningarskipan

Búskaparráðið sigur, at hesin ójavni elvir til ósamsvar í livistøðinum.

- Fara kommunurnar at fylla uppaftur meira í almenna búskapinum, verður munurin enn størri. Tí verður neyðugt við kommunalari útjavningarskipan, um bøtast skal um henda ójavna.

Ráðið er tí sannført um, at landsins politikarar eiga at skipa eina millumkommunala útjavningarskipan, har kommunurnar rinda til hvørja aðra innanhýsis og soleiðis útjavna útreiðslutørv og inntøkur.

- Útjavningin eigur at verða stór, tú tess størri útjavningin er, jú meira líkt verður tænastustøðið í kommunum.

Sambært niðurstøðuni í frágreiðingini hjá Búskaparráðnum verður tí mælt til eitt utjavningarstig áljóðandi umleið 90%.

- Inntøkuútjavningin er rættiliga greið í einari millumkommunalari útjavningarskipan, men útreiðsluútjavningin krevur meira umhugsni. Neyðugt verður at áseta útreiðslutørvin í hvørjari einstakari kommunu.

Hinvegin, sigur ráðið, at støða má takast til,

hvørjar útreiðslur skulu við í útjavningina, og her